# Fuglafjørður frá víkingaøld

Fyrstu tekin um búseting í Fuglafirði fingust í 1956, tá ið grivið varð út fyri eini hoyggjhúsgrund heimi á Oyruni. Komið varð niður á eina húsatoft við fjósi. Við at grava longur niður, kom til sjóndar, at 5 hús høvdu staðið oman á hvørjum øðrum á somu grundini, og hvørt var avtoftað eftir annað. Kanningar vístu, at tey elstu húsini vóru frá víkingaøldini, um ár 950 - 1050.Í 1781 eru 4 býlingar í Fuglafirði. Við Gjógvara, Við Garð, Í Toftum og á Áargarði. Miðskeiðis í 1800-talinum og frameftir komu býlingarnir Á Trøðni, á Bakkanum og á Høvdanum. Í 1920-árunum vóru allir vóru allir býlingarnir samanvaksnir. Í 1940-árunum komu býlingarnir í Rossagerði (í neðra), í Fløtugerði og vestur á Horn, og frá 1970-árunum hevur verið bygt á Bjarnafløtum, í Toftabønum og Norður í Bø. Við fyrstu fólkateljingina í 1801 búðu 128 fólk í Fuglafirði. Fólkateljingin í 1901 sigur frá, at tá búðu 325 fólk í Fuglafirði. Hundrað ár seinni (2001) búðu 1547 fólk í Fuglafirði. Í mars 2007 búðu 1572 fólk í Fuglafjarðar kommunu.



# Ringt at finna upp á n

## Varmakelda 07



**Skráin fyri stevnuna í Fuglafirði verður ikki nógv øðrvísi enn tær undanfarnu. - Allar stevnurnar líkjast ov nógv, sigur ein av fyriskiparunum, Vónbjørt Olsen**

STEVNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** Um vikuskiftið bjóðar Fuglafjørður seg fram sum vertur fyri ársins Varmakeldustevnu.

Í eina tíð hevur ein nevnd við umboðum úr teimum ymsu ítróttarfeløgunum fyrireikað skránna. Nú er hon klár.

Tá Vónbjørt sjálv hyggur eftir skránni, kann hon staðfesta, at tað er ikki so einfalt at fáa alt at hanga saman eitt slíkt vikuskifti:

Fólk eru longu farin í summarfrí. Tey vilja ikki hava annað at hugsa um, og mong eru kanska longu farin av landinum.

– Tað er líkasum ikki sami hugurin at fara á stevnurnar longur. Tíðin er nærum farin frá teimum, staðfestir Vónbjørt.

Varmakeldan 2007 verður annars sett leygardagin kl. 14 av Egon Øregaard.

### Spurningur um at yvirliva

Varmakelda verður hildin á hvørjum ári, men FM-róðurin í kappróvging telur bara við annaðhvørt ár.

Í ár telur hann við, men tað ger hann altso ikki næsta ár. Hetta síggja eisini tey aftur, sum fyrireika stevnurnar.

– Kappróðurin er hann, ið dregur nógv fólk higar. Men við tí nógv minkandi áhuganum, er bara spurningur um tíð, hvussu leingi stevnurnar kunnu yvirliva, staðfestir Vónbjørt.

Fyrr vóru fáar bygdastevnur, har fólk í hópatali leitaðu sær hvørt einasta vikuskifti. So er ikki longur.

Í dag er Varmakelda bara ein stevna millum mangar aðrar fyri mong. Men fuglfirðingar í býi og av býi munnu kortini síggja fram til eitt vikuskifti, har teir kunnu koma saman á henda hátt.

### Okkurt nýtt

Nú eru stevnur á hvørjum tanga og haraftrat eru tónleikafestivalarnir komnir aftrat.

– Vit hava umrøtt nógv viðurskifti í sambandi við stevnuna, og hava roynt at hyggja eftir, hvat hinar stevnurnar ikki hava.

– Men skráin í ár kortini verður stórt sæð tann sama sum tann í fjør, sigur Vónbjørt eitt sindur hørm á málinum.

Veruleikin við stevnunum og vakra navn hennara hava eftir øllum at døma ikki so nógv til felags!

Vónbjørt sjálv hevur einki ímóti festivalunum, men sær bara fyri sær, at tað er helst bara ein spurningur um tíð, nær bygdastevnurnar detta niðurfyri.

– Eg vóni sjálvandi ikki at vit koma so langt. Tað er kortini ein sannroynd, at tað er ringt hjá okkum at finna uppá nakað nýtt á hvørjum ári.

- Vit kunnu bara staðfesta,

## Ein varmakelda uttan Varmakeldu

**Varmakelda – undir eiðinum millum Fuglafjørð og Gøtu – er heit kelda umleið 19 stig. Fólk vildu vera við, at vatnið úr henni átti heilsubøtandi megi. Siður var áður at koma saman við kelduna á gomlu Jóansøku, náttina millum 4. og 5. juli. Undanfarin ár hevur somuleiðis verið siður hjá stevnuluttakarum at fara út á hetta staðið, har røða, felagssangur og føroyskur dansur plagdu at vera á skránni. Í ár verður kortini øðrvísi. Tiltakið úti á Varmakeldu verður ístaðin við Mentanarhúsið í Fuglafirði. Orsøkirnar til hetta eru mangar, m.a. at tað liggur so langt burtur frá sjálvari stevnuni og at tað haraftrat hevur viðrað so stak illa tey seinastu árini. – Tí hava vit valt at flyta hetta tiltakið í ár, sigur Vónbjørt Olsen**